






Besta útgáva:

# - Hetta var ikki verri

Tá Jens Marni kom upp á pallin fyri aðru ferð leygarkvøldið fyri at taka ímóti virðislønini fyri bestu útgávu 2008, nýtti hann høvi at takka konuni og framleiðaranum av fløguni.

- Hetta var ikki verri. Eg eri ótrúliga væl nøgdur. Bara at koma við á listan er stórt, og so at vinna báðar prísirnar, tað er fantastiskt.

Jens Marni dugdi ikki at taka dagar ímillum hvønn prís hann var glaðari fyri.

- Tað er heilt klárt ein samanhangur ímillum hesar prísirnar. Av tí at útgávan er so góð, eri eg eisini komin í uppskot til besta sangara, tey tingini hanga saman.

Jens Marni hevði tó ikki høvi at njóta sigurin, tí eftir tiltakið í Miðlahúsinum fór hann beint til arbeiðis. Hann skuldi nevniliga spæla í heimbygdini Kollafirði seinni um kvøldið.

Àrsins ùtlendska navn:

# Coldplay møtti ikki upp

Sum siður er á tónleikahandanum, var eisini ein Planet latin fyri ársins besta útlendska navn. Eingin ivi var um hvør skuldi vinna hendan heiðurin, tí Coldplay kom klárt inn á fyrsta plássið.

Teir møttu tó ikki í Miðlahúsinum fyri at taka ímóti Planet virðislønini, og ístaðin var tað Eirikur Lindenskov frá Sosialinum, sum fekk heiðurin at trína á pallin í staðin fyri Coldplay.



